# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 28.05.2018*

**Bygdaráðsfundur: 28.05.2018 kl. 18.00 til kl. 18.50**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd:** | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 35/2018 Ársroknskapin 2017 – Nes kommuna**

J.nr. 00.32.10-S08-2-16

**Málslýsing**

Viðgerð og góðkenning av grannskoðaða ársroknskapinum fyri 2017 hjá Nes kommunu, soleiðis sum hann er uppsettur av SPEKT.

**Avgerð**

Bygdaráðið viðgjørdi roknskapin og samtykti bygdaráðið at góðkenna ársroknskapin fyri 2017.

*Ársroknskapurin fyri 2017 sæst á heimasíðuni undir leinkjuni, kommunan í tølum.*

**Mál nr. 36/2018 Eykajáttanir 2018 – Nes kommuna**

J.nr. 00.32.10-S08-3-17

**Eykajáttanir 2018**

| | |
|---|---|
| **Rakstur** | |
| §4 skúlin | 100.000 |
| §5 Svangaskarð | 200.000 |
| §6 Reinsiverkið | 120.000 |
| **Eykajáttan Rakstur í alt** | **420.000** |
| | |
| **Íløgur** | |
| §1 Kommskr. | 70.000 |
| §4 Skúlin | 1.200.000 |
| §5 Svangaskarð | 710.000 |
| §6 Vegir | 1.400.000 |
| **Eykajáttan Íløgur í alt** | **3.380.000** |
| | |
| **Eykajáttan í alt** | **3.800.000** |

Samlaða eykajáttanin fevnir um:
- kostnað og íløgur sum var játtað og umbiðið í 2017, men arbeiðið er ikki liðugt og goldið fyri enn í 2018. Íalt kr. 1.848.000.
- Ov lítið avsett til rakstur og íløgur í 2018. Íalt kr. 752.000.
- Íløgukostnað í Tofta skúla, sum er ætlaður í 2019, men framskundaður til 2018. Íalt kr. 1.200.000.

**Tilmæli**
Á fundi 23.05.2018 mælir fíggjarnevndin til at taka undir við eykajáttanunum fyri 2018. Peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 37/2018 Ársroknskapur 2017 – Roðin**
J.nr.00.32.10-S08-9-16
**Málslýsing**
Ársroknskapurin fyri 2017 hjá Roðanum er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

**Tilmæli**
Á fundi 28.05.2018 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum hjá Roðanum soleiðis, sum hann er uppsettur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 38/2018 Heimild at strika gamla skuld – Nes Sóknar Musikkskúli**
J.nr. 20.07.00-G01-1-18
**Málslýsing**
Í skrivi 22.05.2018 heitir nevndin fyri Nes Sóknar Musikkskúla á kommununa um, at Musikkskúlanevndin fær heimild til at strika gamla skuld soleiðis, at nevndin ikki hevur fyri neyðini at leggja tílík mál fyri kommunustýri hvørja ferð .

**Tilmæli**
Á fundi 23.05.2018 mælir Fíggjarnevndin til, at nevndin fyri Musikkskúlan fær heimild til at strika gamla skuld.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 28.05.2018*

**Mál nr. 39/2018 Umsókn um loyvi til tilbygning – Hans Akselsson Petersen**
J.nr. 02.34.02-P20-10-18
**Málslýsing**
Í skrivi 22.04.2018 søkir Hans Akselsson Petersen um loyvi til at byggja afturat sethúsum sínum matr. nr. 585.

Loyvið snýr seg um tilbygning á sunnaru síðu av húsinum. Tilbygningurin er ætlaður sum bilhús við ráum kjallara, og møguleika fyri tveimum kømrum á ovastu hæddini.

Ein tilbygningur er sunnanfyri húsini. Ætlanin er, at hesin verður tikin niður, so bilhús kan byggjast ístaðin.

Hjálagda uppskot kemur at viðføra ein tilbygning, ið liggur á mark.

Ætlanin er eisini at skifta klædningin og vindeygu á verandi sethúsum. Biðið verður eisini um loyvi til at skifta klædning og vindeygu á verandi sethúsinum.

**Tilmæli**
Á fundi 15.05.2018 mælir Tekniska nevnd til, at hann ognar sær 3 m afturat suðureftir, og at hann fær prinsippielt loyvi til uppíbyggingina.

Á fundi 15.05.2018 mælir Tekniska nevnd til, at Hans A. Petersen fær loyvi til at skifta klædning og vindeygu á verandi húsum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 40/2018 Umsókn um grundstykki – Maria og Remi Langaard**
J. nr. 02.34.02-P20-11-18
**Málslýsing**
Í skrivi 27.04.2018 søkja Maria og Remi Langaard um grundstykkið til sethús,  matr nr. 83c við Nesveg.

**Tilmæli**
Á fundi 15.05.2018 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan ogna sær lendið til grundøkið, at selja víðari til Mariu og Remi Langgaard**.**

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt santykt.

**Mál nr. 41/2018 Fyrispurnigur viðv. grundøki matr. nr. 83c á Nesi – Jóhan Johannesen**
J.nr. 02.04.02-P20-13-18
**Málslýsing**
Í skrivi 14.05.2018 spyr Jóhan Johannesen um møguleiki er fyri:

- At leiga stykkið fyri eina tíð, við seinri keyp fyri eyga?
- Um hesin møguleiki ikki er til staðar, hvat er so samlaður prísur fyri stykkið?

**Tilmæli**
Á fundi 15.05.2018 mælir Tekniska nevnd til at boða Jóhan Johannesen frá, at annar umsøkjari hevur fingið játtað grundøkið matr. nr. 83c.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 42/2018 Umbøn um játtan til nýggjan KT- útbúnað – Tofta skúli**
J.nr. 85.11.00-G12-1-18
**Málslýsing**
Tofta skúli kunnar Nes kommunu um, at tey hava biðið tveir KT-veitarar um óbindandi tilboð upp á 50 Chrombook-teldur, 2 telduskáp og eyka løðarar, tí tey meta, at tað er alneyðugt, at skúlin fær fleiri næmingateldur, so at tey fáa nøktað ein bráðneyðugan tørv á næmingateldum.

Í fíggjarætlanini fyri 2018 hava tey fingið eina játtan á 100.000 kr. til nýggjan KT-útbúnað, men vilja vísa á, at longu nú er brúkt av hesi upphædd til m.a. nýggjar ljóskanónir og viðlíkahald av øðrum telduútbúnaði.

Skúlin søkir um eina meirjáttan til at kunna taka av lægra tilboðnum, sum er frá Nema.

**Tilmælir**
Á fundi 15.05.2018 mælir Mentanarnevndin til at játta Tofta skúla at taka av tilboðnum frá Nema.

Og heitt verður á leiðslu skúlans at koma við eini heildarætlan viðv. kt-útbúnaðinum í skúlanum.

Á fundi 23.05.2018 mælir Fíggjarnevndin til, at skúlin í fyrsta umfari keypir 25 eindir frá Nema, og kemur við einari heildarætlan til komandi fíggjarár, og at játtanin í 2018 til kt-útbúnað í Tofta skúla verður hækkað við kr. 50.000,00. Peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt, sostatt fellur tilmælið frá Mentanarnevndini burtur.

**Mál nr. 43/2018 Innbúgv v.m. til ítróttarhúsið á Svangaskarði**
J.nr. 82.07.00-P20-1-15
**Málslýsing**
14. februar 2018 vóru umboð fyri Tofta Ítróttarfelag á fundi við Mentanarnevnduna, har m.a. varð tosað um møguleikar við ymiskum virksemi og møguleikum í B68 húsinum.

Eftirfylgjandi hevur verið biðið um tilboð uppá innbúgv v.m.

**Tilmæli**
Á fundi 18.04.2018 mælir Mentanarnevndin til, at áðrenn játtan til keyp verður givin, skal felagið koma við m.a.:

- Eini verkætlan.
- Eini ætlan um hvussu viðurskiftini verða skipaði.

Í skrivi 14.05.2018 greiðir Tofta Ítróttarfelag frá hvussu møguligt virksemi kann verða í ovastu hædd í B68-húsinum og hvussu tað kann skipast.

Fyri at kunna seta hetta virksemið í gongd er neyðugt, at innbúgv o.a. verður keypt til kømrini. Felagið heitir tí á Nes kommunu um at fáa keypt innbúgv v.m til dagføring av kømrinum.

**Tilmælir**
Á fundi 15.05.2018 mælir Mentanarnevndin til at játta keyp av innbúgvi v.m. til ítróttarhúsið á Svangaskarði.

Á fundi 23.05.2018 mælir Fíggjarnevndin til at játta kr. 80.000 til keyp av innbúgvi v.m. til ítróttarhúsið á Svangaskarði. Peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var eimælt samtykt.

**Mál nr. 44/2018 Um– og útbygging av Frítíðarskúlanum**
J.nr. 82.06.00-P20-1-17
**Málslýsing**
Trivnaðarnevndin hevur í meiri enn 1 ár arbeitt við ætlanum við um- og útbygging av verandi frítíðarskúla. Trivnaðarnevndin hevur í hesum sambandi, í samstarvi við leiðsluna í Frítíðarskúlanum og Barnagarðinum, mett um framtíðar tørv v.m.. Fuglark hevur ráðgivið við tekningum og kostnaðarmetingum. Vitjað hevur eisini verið á nýggjum frítíðarskúla í aðrari kommunu.

Leiðslan í Frítíðarskúlanum mælir til, at Frítíðskúlin framyvir hevur somu staðseting.

Kostnaðarmetingar eru gjørdar viðv. um- og útbygging, eins og fyri niðurtøku av verandi frítíðarskúla og byggja nýggjan bygning í tveimum hæddum.

Ætlanin hevur verið, at arbeiðið við hesi íløgu skal byrja í 2018. Í fíggjarætlanini fyri 2018 er avsett kr 1.600.000.

Umframt, at um- og útbyggja verandi frítíðarskúla, er nýgerð av hølum til skúlabólkin, sum er elsti árgangur í barnagarðinum, eisini viðgjørdur. Ætlanin er, at hesi høli verða

bygd afturat verandi frítíðarskúla norðureftir. Kostnaðarmetingar eru gjørdar at byggja í einari hædd og í 2 hæddum, har kjallarin í fyrsta umfari er bjálvaður, men ikki innrættaður.

**Tilmælir**
Á fundi 17.05.2018 er Trivnaðarnevndin samd um, at Frítíðarskúlin skal um- og útbyggjast, og at bygningur verður bygdur, afturat frítíðarskúlanum, til skúlabólkin.

Tvær kostnaðarmetingar eru uppá um- og útbygging og ein uppá nýbygging.
Kostnaðarmeting uppá um- og útbygging dagf. 12.09.2017 kr. 3.177.682.
Kostnaðarmeting uppá niðurtøku og nýbygging dagf. 15.05.2018 kr. 8.034.867.

Nýbygging til skúlabólk dagf. 15.05.2018 uttan kjallara kr. 3.562.940.
Nýbygging til skúlabólk dagf. 15.05.2018 við kjallara sum er bjálvaður kr. 4.713.578.

Allar kostnaðarmetingar eru við møblum, projektering, eftirliti og mvg.

Nevndin varð samd um, at ynskiligt hevði verið at bygt nýtt, men eftir drúgt orðaskifti er nevndin komin til tað niðurstøðu:

- at mæla til at arbeiða víðari við kostnaðarmetingini frá 12.09.2017, sum umfatar um- og útbygging.

- at mæla til at arbeiða víðara við kostnaðarmeting frá 15.05.2018, sum umfatar nýbygging til skúlabólkin við kjallara.

Á fundi 23.05.2018 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini, og mælir til, at arbeiðið við um- og útbygging verður boðið út.

Endalig fígging av um- og útbyggingini verður tikin uppaftur, tá tilboð fyriliggja.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt.

**<u>Mál nr. 45/2018   Tilboð uppá umvæling og nýbygging av Tofta skúla</u>**
<u>J.nr. 82.07.00-P20-2-17</u>
<u>J.nr. 09.01.07-K09-1-16</u>
**Málslýsing**
Vegna Nes kommunu hevur Teknistovan Gøta bjóðað arbeiðið út viðv. umvæling av fasadu á 81'bygninginum og nýbygging av teknikrúmi til svimjihylin.

Útbjóðingartilfar varð latið 9 veitarum, tilboðini skuldu latast inn í seinasta lagi 15.05.2018.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 28.05.2018*

Eitt tilboð kom inn frá Búsetur. Tilboðið er áljóðandi kr. 2.945.462,00. Kostnaðarmetingin var kr. 2.936.350,00.

Teknistovan Gøta hevur gjøgnumgingið tilboðið og vil mæla til, at kommunan fer í sáttmálasamráðingar við Búsetur.

**Avgerð**
Bygdaráðið samtykti einmælt at fara undir sáttmálasamráðingar við Búsetur.